# Wembley Stadium

Tjóðarvøllurin hjá enska landsliðnum er Wembley Stadium, sum liggur í London Borough of Brent. Tað er enska fótbóltssambandið, FA, sum gjøgnum dóttirfelagið Wembley National Stadium Limited, ið eigur stadium, sum fyrst og fremst verður nýtt til landsdystirnar hjá enska landsliðnum, eins og til heimligar finalur. Somuleiðis verður vøllurin nýttir til aðrar ítróttakappingar eins og til tónleikakonsertir. Við sínum 90.000 áskoðaraplássum er Wembley næststørsti ítróttavøllur í Europa (næst eftir Camp Nou) og tað størsta í heiminum við øllum setrum yvirdekkaðum. Beint sum tað lat upp, var tað ofta nevnt sum »the new Wembley Stadium« fyri at skilja tað frá tí upprunaliga. Wembley er samstundis dýrasta stadium í heiminum. Undanfarna Wembley Stadium – upprunaliga kent sum British Empire Exhibition Stadium, ella Empire Stadium – var ein av kendastu fótbóltsvøllunum í heiminum, kendur bæði sum enski tjóðarvøllurin og tað, at fótbóltsspælið sigst vera ment í Onglandi »the Home of Football«. Vøllurin hevur verið vertur fyri Europa Cup finalunum (nú Champions League) metofta, nevniliga heilar fimm ferðir, og er eitt av seytjan stadium, sum hevur hildið eina HM-finalu. Í 2003 var upprunaliga stadium'ið rivið niður og byrjað var at byggja eitt nýtt, sum eftir ætlan skuldi standa liðugt í 2006. Seinni varð henda tíðarætlan broytt, og 9. mars 2007 var lykilin til Wembley Stadium endiliga handað enska FA.






















